NES KOMMUNA

650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

## Barnagarðurin á Svangaskarði, Toftir søkir eftir námsfrøðingum

**Til Barnagarðin verður søkt eftir:**

- 1 námsfrøðingi at arbeiða 30 tímar um vikuna
- 1 námsfrøðingi at arbeiða 30 tímar um vikuna í tíðaravmarkað starv, at seta frá 16.08.2010 til 23.12.2010, fyri námsfrøðing í farloyvi.
- 3 námsfrøðingum at arbeiða 20 - 40 tímar um vikuna tíðaravmarkað frá 16.08.2010 til 15.07.2011 til serligan tørv.

Barnagarðurin er ein ítróttarbarnagarður

Í barnagarðinum eru 56 børn.

Barnagarðurin liggur við stadionøkið á Svangaskarði, tætt við náttúruna og við nógvum møguleikum at vera úti.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**

- Dugir at seta seg inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- Hevur góð samstarvsevnir og kann taka ábyrgd
- Er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- Hevur hug at røra seg og vera nógv úti í náttúruni

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið í skala 11 – 18

Um eingin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett tíðaravmarkað ístaðin.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðarin í Barnagarðinum á tlf 448760/565021

**Umsóknir**
saman við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða Nes kommunu í hendi í seinasta lagi 18.06.2010.

**NES KOMMUNA**
**650 Toftir**
**www.nes.fo**
**nes@nes.fo**

FØROYA PEDAGOGFELAG

## Nýtt telefonnummar

Føroya Pedagogfelag hevur broytt telefon nr. – telefonnummarið er nú 357576

Føroya Pedagogfelag

# Ítróttardagur

**Stuðulstænastan hjá Nærverkinum og Sinnisbati bjóða til ítróttardag í Roynhøllini í Hvalba mikudagin 23. juni 2010 kl. 11.00-17.00.**

**Skrá fyri ítróttardagin**

| | |
|---|---|
| 11.00 | Innskriving + luttøkugjald. |
| 11.15 | Ábit – Otto Vest borgarstjóri í Hvalba, bjóðar vælkomin. |
| 12.00 | Upphiting. |
| 12.45 | Fótbóltur og boccia. |
| 13.15 | Kaffi/th, køkur og frukt. |
| 14.00 | Stafett-kapping og rundbóltur |
| 15.30 | Hermann Mortensen handar heiðursmerkir. |
| 16.00 | Borðhald v/felagssangi og undirhald. – Heilsan frá Sinnisbata og Roynhøllini |
| 17.00 | Mary í Garði, stjóri í Nærverkinum endar dagin. |

Ítróttardagurin er ætlaður persónum við avmarkaðum sálarligum førleika og starvsfólkum, ið arbeiða innan hetta økið. Brúkarar og starvsfólk luttaka á jøvnum føti í teimum ymisku ítróttargreinunum.

Endamálið við ítróttardegnum er fyrst og fremst at hava tað stuttligt saman, at røra seg og síðst, men ikki minst, at knýta samband millum tey luttakandi.

Um onkur ikki kann/vil luttaka í kappingunum, er viðkomandi tó vælkomin við sum fjeppari.

Til ber at luttaka í 2 ítróttargreinum. Í samband við innskriving í Hvalba verður boðað frá hvørjari grein ein ynskir at luttaka í.

Tá kappingarnar eru lidnar verða heiðursmerki latin vinnandi liðunum og einstaklingunum.

Boðast skal frá luttøku í seinasta lagi 16. juni á tlf 764130 ella við at senda ein teldupost til magnusi@naerverk.fo

Luttøkugjald á kr. 150 skal gjaldast í samband við innskriving í Hvalba kl. 11.00. Við í prísinum er ábit, frukt, kaffi/te, køkur og borðhald.

NÆRVERKIÐ SINNISBATI

**Sosialurin**
www.sosialurin.fo

Sp/f. GRAVSTEINAR




*Opið: mánadag - fríggjadag $9^{00}$-$17^{00}$*
*annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74

LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

## Løgfrøðingur til Løgtingsins umboðsmann

Í sambandi við farloyvi er eitt tíðaravmarkað starv sum avloysari fyri ráðgeva hjá Løgtingsins umboðsmanni leyst at søkja. Starvið verður sett skjótast gjørligt fyri tíðarskeiðið frá 1. august 2010 til 31. juli 2011.

**Embætið**
Umboðsmaðurin, ið virkar sambært løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000, fór undir virksemi sítt 1. mai 2001. Uppgávan hjá umboðsmanninum er at hava eftirlit við almennu fyrisitingini undir heimastýrinum, herundir at viðgera klagur frá borgarunum um avgerðir v.m. Á skrivstovuni starvast dagliga umframt umboðsmannin, tveir løgfrøðiligir ráðgevar og ein skrivstovufulltrúi.

**Uppgávurnar**
Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum:
- fyrireiking og viðgerð av innkomnum klagum
- uppgávur í sambandi við eftirlitskanningar av málsviðgerðini á útvaldum økjum, og
- kunningarvirksemi um fyrisitingarlig evni og um virksemið hjá umboðsmanninum.

Talan er um eitt rættiliga avbjóðandi starv í tøttum samstarvi við umboðsmannin.

**Setanartreytir**
Tann, sum settur verður, skal hava prógv sum løgfrøðingur. Stórur dentur verður harumframt lagdur á royndir eftir lokna útbúgving, og er tað ein fyrimunur, um viðkomandi hevur starvsroyndir innan almennu fyrisitingina.

Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya. Møguleiki er fyri setan sum ráðgevi II, um førleikin og royndirnar eru til tess. Tann, sum settur verður, má tola møguligar broytingar í arbeiðsuppgávunum.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. skulu verða umboðsmanninum í hendi **í seinasta lagi fríggjadagin 18. juni 2010**, kl. 12. Adressan er:

Løgtingsins umboðsmaður
Traðagøta 43
Postsmoga 2008
165 Argir

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sólju í Ólavsstovu, umboðsmann á tlf. 358500/218691.

DEKKMASTER.FO



**18" RS4 look**
**Við 225/40-18 dekkum**
Original-look felgur til VW/Audi.
Eru á goymslu í 5x100 og 5x112

Fyrr 9.990,-
NÚ 7.990,-

www.dekkmaster.fo · info@dekkmaster.fo · tel. 227 000